

**Troyttist ongatíð av Elisabeth Schwartkopf**
»Stille Nacht, heilige Nacht« er jólasálmur Sonna Smith

**Jólini kosta 4400 krónur**
Hvør donsk familja má av við omanfyri 4000 krónur í jólamánaðinum

Sosialurin
Mánadagur
29. november 2010

# Jólablaðið



*Æðuvík er eitt týðandi ferðamál í Eysturoy, tá bygdin er upplýst við alskyns jólaperum og pynti í jólamánaðinum*
*Mynd: Hjalmar Juul*

# Jólabygdin er tendrað

**Í Æðuvík siga tey, at nú jólabygdin er tendrað, fer bygdarfólkið í vikuskiftinum fram til jólar at hava sølu av kaffi, vaflum og rísalamande í kjallaranum í Missiónshúsinum**

Vilmund Jacobsen

Jólabygdin Æðuvík er tendrað. Hetta hendi við eina hugnaliga løtu klokkan 19 í gjárkvøldið. Serstaka jólabygdin fram um aðrar lýsti og øll, sum komin vóru til Æðuvíkar, fegnaðust – børnini ikki minst.

Tó at tað var kavi, kalt og hált at koyra til og úr Æðuvík, var væl av fólki komið til løtuna. Onkur helt, at heldur færri vóru í ár enn í fjør, og hetta hevur helst eisini sína orsøk. Tað er trongligt í Æðuvík, og tá kavi og hálka eru, er eisini avmarkað, hvussu nógvir bilar sleppast kann av við í bygdini nærindis haldinum.

Í Æðuvík siga tey, at vanliga leita nógv fólk til bygdar longu sama kvøld, tá haldið er liðugt, og bygdin er tendrað.

Eftir at fólk vóru boðin vælkomin, helt Annlis Bjarkhamar eina røðu, og her nýtti hon eisini høvi at lýsa átakið »Í menniskjum góður tokki«, ið hjálpir børnum í familjum við truplum fíggarligum korum, so tey kunnu halda eini virðilig jól.

Nes sóknar Hornorkestur setti sín hugnaliga dám á løtuna í Æðuvík, eins og orkestrið hevur gjørt, nú jólatrø eru tendrað kring um í kommununi og í grannabygdum.

Við løtuna í Æðuvík vóru eisini jólamenn, sum gleddu børnini við pakkum. Eftir haldið, sum var við Missiónshúsið, bjóðaði bygdin til gløgg og holukøkur.

Í Æðuvík siga tey, at nú jólabygdin er tendrað, fer bygdarfólkið í vikuskiftinum fram til jólar at hava sølu av kaffi, vaflum og rísalamande í kjallaranum í Missiónshúsinum. Ætlanin er at selja kaffi og vaflur fríggjakvøld og leygarkvøld – og kaffi og rísalamande sunnukvøld.

Nú útibarnagarður ikki longur er í Missiónshúsinum, ber væl til at hava sølu í kjallaranum.

Jólabygdin dregur rættiliga nógv avbygdafólk til sín, og ferðslan til og úr Æðuvík meiri enn tvífaldast hesar dagarnar, bygdin er upplýst við alskyns jólaperum og pynti – hugsandi eins væl og óhugsandi hjá tí, sum ikki hevur vitjað í bygdini eitt slíkt kvøld til jólar áður.

Landsverk hevur áður upplýst, at miðalferðslan um døgnið til og úr Æðuvík liggur um 350 akfør, men í tíðini, tá bygdin er tendrað, ferðast kanska einir 800-900 bilar um samdøgnið til og úr bygdini.

vilmund@sosialurin.fo